nánd
Heimatænastan

# Ársfrágreiðing 2016

## Stýrið

Jóhan Christiansen, formaður (Eysturkommuna)

Sonni á Horni, næstformaður (Fuglafjarðar kommuna)

Hanna Jensen, stýrislimur (Eysturkommuna)

Uni Rasmussen, stýrislimur (Eysturkommuna)

Ólavur Larsen, stýrislimur (Fuglafjarðar kommuna)

## Leiðari

Kristina Toftegaard Larsen

## Umsiting

Fíggjarviðurskiftini hjá Nánd eru komin í eina skipaða legu. Nánd uppfyllir krøvini sum landsins myndugleikar seta, og stýrið hevur gott yvirlit yvir fíggjarstøðuna. Fyri árið 2016 vóru serliga lønaravsetingarnar ov lágar. Hetta er rættað til fíggjarætlanina 2017. Áhugavert er at leggja merki til kostnaðarstøðið hjá Nánd, samanborið við aðrar heimatænastur. Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommuna rinda minst til samstarvið pr. borgara 67+ í landinum, og næstminst roknað pr. borgara í kommununum. Víst verður til síðu 4 í grannskoðarportokollinini 2016. Vert er at leggja afturat at vit, hóast hetta, meta okkum at hava eina fullgóða tænastu, samanborið við aðrar heimatænastur.

## Fysisku karmarnir

Vesturstova hevur verið merkt av umvælingum. Á gongini vestureftir er eitt kamar minni, og 2 vesir eru gjørd ístaðin. Vesini eru nútímans og hava allar hentleikar. Somuleiðis er skrivstovan umvæld, so hon er meira arbeiðslig og møguleiki er fyri at hava smáar fundir á skrivstovuni. Fysisku karmarnir á Vesturstovu eru betraðir, men enn væntar nakað í, fyri at karmarnir kunnu metast at vera rímiligir.

## Tillagað tænasta og normering

Vesturstova hevur nú møguleika at hýsa 12 búfólkum, ístaðin fyri 14. Tímatalið til starvsfólk er tillagað samsvarandi.

## Trivnaður

Árið hevur verið merkt av javnvág og nøgdsemi. Hóast hetta, hevur leiðslan fingið ábending um, at arbeiðsbyrðan á sambýlunum um dagin er tung. Tað er ein sannroynd, at húsfólkini á sambýlunum gerast alsamt tyngri, og nýggju borgararnir, ið fáa játtað búpláss, eru verri fyri í dag enn áður. Ein orsøk til, at borgararnir eru tyngri, er hugburðurin hjá Nánd um, at fólk skulu verða sum longst í egnum heimi, eins og missiónin hjá Nánd leggur upp til: "at hava dygdargóðar tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at borgarin kann búgva sum longst í egnum heimi."

Eitt felags tiltak var á Kambsdali undir heitinum arbeiðsgleði. Hetta varð sett á skrá sum ein liður í at fyribyrgja strongd hjá starvsfólkum. Í høvuðsheitum snúði fyrilesturin seg um, "*at møta glað til arbeiðis og fara glað heima aftur frá arbeiði*", soleiðis at gerandisdagurin ber brá av góðum og virðiligum samstarvi, so at øll fáa ein góðan og stuttligan arbeiðsdag, har trivnaður og gleði stendur fremst. Tess betur starvsfólkabólkurin trívist, tess betur smittar hetta av uppá húsfólk og borgarar.

nánd
Heimatænastan

## Strategi

Leiðslubólkurin hevur í árinum arbeitt við evninum strategi. Fyrsti partur av strategiska arbeiðinum snúði seg um missión, visjón og virðir, ið lýsa yvirskipaðu orðingarnar fyri Nánd. Niðanfyri varð samtykt á stýrisfundi tann 20. septembur 2016.

### Missión

Nánd hevur dygdargóðar tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at borgarin kann búgva sum longst í egnum heimi.

*Tilboðini hjá Nánd fevna um :*

- Røkt
- Sjúkrarøkt
- Fyribyrging
- Endurmenning
- Dagtilboð
- Búpláss og umlætting

### Visjón

Nánd vil vera í fremstu røð við at stuðla undir lívsgóðsku, sjálvbjargni og heilsufremjan.

*Lívsgóðska*

Nánd viðurkennir sjálvsavgerðarrætt hins einstaka og sær týdningin av at borgarin hevur ábyrgd av egnum lívi. Nánd ynskir at stuðla undir tað, ið gevur hvørjum einstøkum meining í lívinum. Tað kann vera at varðveita góða likamliga og sálarliga orku, sunnan lívsstíl, sosialt samanhald ella annað, ið borgarin sær meining í.

*Sjálvbjargni*

Nánd vil geva borgarum møguleika fyri sjálvbjargni við at stimbra hinum einstaka til at taka ábyrgd av egnum lívi.

*Heilsufremjan*

Nánd ynskir at veita borgarum sínum tilboð, ið mest møguligan mun seta fokus á tað sum er gott fyri heilsuna. Nánd vil stuðla og kveikja borgarar likamliga, sálarliga, sosialt og andaliga.

### Virðir

Nánd leggur dent á:

1. At hava álit
2. At fremja gleði í gerandisdegnum

3. At veita fakliga umsorgan

*At hava álit*

Nánd leggur dent á álit í dagligdegnum og vil møta borgaranum við jaligum hugburði. Nánd hevur virðing fyri, at borgarar eru ymiskir og hava ymiskar væntanir og ynskir til tænastuna.

*At fremja gleði í gerandisdegnum*

Nánd vil, har serligar avbjóðingar eru í lívinum, arbeiða fyri, at borgarin hevur gleði í gerandisdegnum. Hetta vilja vit gera við at taka støði í tí einstaka, kenna lívssøgu teirra, og soleiðis vera betur før fyri at hjálpa borgaranum at vera virkin í tí, sum gevur meining fyri honum.

*At veita fakliga umsorgan*

Nánd veitir heimarøkt og sjúkrarøkt eftir tørvi hins einstaka borgara í egnum umhvørvi. Nánd vil veita borgaranum umsorgan og røkt, so hesin upplivir tryggleika, nærlagni og fakliga dygd.

## Endurvenjing

Økisterapiin endurmetti umstøðurnar at venja og metti, at venjingarumstøðurnar í hølunum hjá kappróðrarfelagnum ikki vóru hóskandi til endurvenjing. Tey mæltu til, at Nánd skuldi finna nýggj hølir og fremja íløgu í maskinur. Umstøðurnar eru kannaðar, og stýrið hevur viðgjørt málið nakrar ferðir í 2016. Í apríl 2017 varð avgerð tikin um, at Nánd skal leiga hølir frá Eysturkommunu í Leirvík til endurvenjing, har Miðstøðin, tað er heimarøktin og sjúkrarøktin, eisini skal halda til.

## Annað

### Samstarvsráð.

Sambært nýggju lógini um Heimatænastu, vóru samstarvsráð skipað fyri hvørt sambýli sær. Stýrið hevur í hesum sambandi samtykt, at ræðisrætturin fyri peningagávur, eitt nú í samband við jarðarferð, fellur til samstarvsráðið á hvørjum sambýlið sær. T.v.s. at tað er samstarvsráðið, ið tekur avgerð um, hvat hesin peningur kann brúkast til.

### Markamótsmálið um búfólk á ERE

Stýrið hevur havt ta fatan, at talan er um prinsipielt mál, ið Almannaverkið varðar av og sendi tí málið í ivamálsnevndina. Ivamálasnevndin hevur gjørt úrskurð um málið, og stýrið er ikki samt við ivamálsnevndini. Málið er ikki avgreitt.

## Avtala um viðlíkahald av deildunum

Í samstarvsavtaluni, millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu um heimatænastu, **eldrarøkt v.m., grein 9. stk. 4. stendur at:** ***"Ognarkommunurnar hava ábyrgd av og bera***

*kostnaðin av at halda ognirnar viðlíka".* Tá óvissa onkuntíð hevur stungið seg upp um hvørjar útreiðslur, ið koma undir viðlíkahald av ognum, samtykti stýrið tann 22. novembur 2016 eitt ískoyti til leigusáttmálarnar, har greitt er tilskila hvørjar útreiðslur ávikavist Nánd og kommunurnar halda. Kommunurnar báðar hava tikið undir við ískoytinum niðanfyri.

## Nánd

Viðlíkahald av leysum innbúgvi, sum fevnir um búnýti og umvæling/keyp av nýggjum búnýti, sum borð og stólar, sofur, reolir v.m. Ljósketir o.a. sum verður gjørt fyri at hugna um, hitavarmarar, lyftiamboð til búfólk, venjingarútgerð, alarmar til sengur og búrúm (tó ikki kravdir alarmar til bygningin).

Leyst innbúgv er m.a. knívar, gaflar, skeiðir, tallerkar, koppar, føt o.a.m., harumframt er leyst innbúgv so sum miksarar, eltól, radio, sjónvarp, breyðristarar og onnur tól og amboð til húsbrúk.

## Kommunan

Viðlíkahald av ognunum fevnir um umvælingar og viðhald av bygningunum, sum er útgreina her niðanfyri. Umframt umvælingar, viðlíkahald og evt. keyp av føstum innbúgvi, tólum, maskinum, og skipanum og sýn/eftirlit av lyftu/elevator, ljósmotorar og markisur.

*viðlíkahald av bygningnum er eitt nú:*

- Vindeygu, úthúrðar, tak, vatn-, luft og hita- skipan
- Økið uttandura, íroknað viðurskiftini fyri atkomu ið er asfalt, flísar, garðar, tún, grøn økir, hegn, benkur og borð.
- Málaraarbeiði, innan- sum uttandurða
- El arbeiði, innan- sum uttanduróa ljóspullertar og gøtuljós

*Fast innbúgv er eitt nú:*

- Køliskáp, uppvaskimaskina, frystiboksir, komfyrar, vaskimaskina og turkitrumla, viðlíkahald av hesum og/ella gjald fyri leigu ella eftirlit
- Lyfta og viðlíkahald av hesari og/ella gjald fyri leigu og eftirlit
- Branskipanir til hurðar o.a. ið er krav sambært myndugleikum og onnur brandskipan, viðlíkahald av hesum og/ella gjald fyri sýn og eftirlit.
- Ljósmotorar og viðlíkahald og eftirlit við hesum
- Møguliga ABA skipan og aðrar skipanir sum eru kravdar av myndugleikum sambært lóg og kunngerð

*Annað:*

- Mála kømur tá ið fólk flyta út úr kømurum, umsjónarfólk skipa fyri at arbeiðið verður gjørt.
- Umsjónarfólk hava ábyrgd av sengrum ið skulu inn/út úr búrúmum.
- Arbeiði og fyrireiking í samband við jarðarferð er ábyrgd hjá umsjónarfólki.
- Er ynski um dunnr, hønir, fuglar og onnur djór til stovnin, skal hetta gerðast eftir nærri avtalu við Nánd og kommununa.

## Stýrisfundir

Stýrið hevur í 2016 havt 6 fundir og viðgjørt 23 mál.

## Frá deildunum

## Vesturstova

Á Vesturstovu eru pláss fyri 12 búfólkum. Við ársskiftið vóru hesi 4 menn og 7 kvinnur. Miðalaldurin var 89 ár. Á Vesturstovu starvast 1 sjúkrarøktarfrøðingur, 3 heilsurøktarar og 5 heilsuhjálparar umframt køksfólk, reingeringsfólk og ítrivsfólk. Køkurin hevur eisini til uppgávu at gera døgurða til brúkarar hjá Nánd í bygdini.

### Fysisku karmarnir

Fysisku karmarnir kunnu verða nógv betur. Hetta er komið væl til sjóndar seinastu tíðina, hvar búfólk eru komin til sína seinastu tíð. Neyðugt hevur verið, at flyta brúkarar á dupultkamari út, og inn í lítlu uppihaldstovuna. Hetta er ein neyðloysn.

### Normering

Búfólkatalið er minkað niður í 12 húsfólk, og normeringin er reguleráð tilsvarandi. Tað at gera broytingar gevur rembingar, so neyðugt hevur verið at hava fleiri fundir, enn vanligt.

### Virksemi

Umframt vanliga virksemið, so sum ítriv, andaktir og vitjanir av barnagarði, varð skipað fyri ymiskum tiltøkum. Eitt nú útferð til Vágarnar, har vit ótu eina góða máltíð á hotellinum og vitjaðu krígssavnið. Í mai mánaði var rørsluvika, tá høvi var hjá fólki at fara ein túr við búfólkum. Í mentanarvikuni í Fuglafjarðar kommunu varð skipað fyri, at Fridleiv Johannesen kom á Vesturstovu at hugleiða. Eysturoyar dansifelag hevði føroyskan dans eitt kvøldið. Eisini onnur hugnakvøld, eitt nú vitjan av Frelsunnarherinum. Eitt kvøld við Niels Midjord og Eileen Hansen. Sum fast er, hava vit havt garðdag og jólahugna.

### Starvsfólkamenning

Nøkur starvsfólk vóru á skeið í dokumentasjón, sum Heilsurøktarafelagið skipaði fyri. Eitt starvsfólk var á medisinskeið. Á einum starvsfólkafundi høvdu vit ein ergoterapeut at greiða frá flytiháttum.

## Gøtubrá

Á Gøtubrá eru 14 búfólk, herav 5 á demensdeildini og 1 pláss er til umlætting. Tó so, var galdandi fyri umleið helvtina av 2016, at onki umlættingarpláss var tøkt. Miðalaldurin er 84,66 ár. Býtið er 5 kvinnur og 5 menn á 1. hædd, og 5 kvinnur á demensdeildini.

### Fysisku karmarnir

Ongin verulig broyting er gjørd í mun til teir fysisku karmarnar ígjøgnum árið. Vit hava fingið gjørt dekkið/útigólvið í sunnara enda av ovaru hæddini av nýggjum, tí her lak niðurundir. Vit hava fingið skift onkur av húsarhaldstólinum út ígjøgnum árið, so sum eina uppvaskimaskinu, 2 ovnar og eina stóra vaskimaskinu. Røktareindin í ovaru hæddini er í stóran mun sera góð. Felagsrúmini eru rúmlig, ljós og atkomulig, og búrúmini við tilhoyrandi baðirúmum eru somuleiðis rúmlig og ljós. Demenseindin í niðaru hæddini hevur somuleiðis eisini búrúm við tilhoyrandi baðirúmum, sum eru rúmlig og ljós. Men felagsrúmini á hesari hæddini eru ikki nøktandi. Køkurin er lítil og myrkur, har er bert eitt vindeyga, har ikki so nógv ljós sleppur inn, tí hetta er undir einum dekki. Stovan er bert eitt búrúm, sum er gjørt um til eina stovu. Her er ræ ttuliga trongligt, tá ið øll sita og hugna sær saman. Gongin er rúmlig, men myrk, tí her kemur onki dagsljós inn uttan tað, sum kemur inn í gjøgnum inngongdsøkið, sum eisini liggur undir dekkinum.

### Virksemi

Gerandisdagurin er merktur av dagligu viðurskiftunum hjá hvørjum einstøkum húsfólki, teirra røktartørvi og 'gøremål'. Starvsfólkini seta seg saman við húsfólkunum, tá ið høvi er til tað, og tá verður lisið upp, sungið og prátað og eisini gingið túrar av og á. Fólk koma regluliga inn at hava andakt, syngja og spæla, upplestur og mangt annað. Í heyst hava vit fingið gjørt eina avtalu við barnagarðin um eina mánaðarliga vitjan av uml. 4 børnum við einum vaksnum. Bingo er eisini komið upp at koyra fast aðru hvørja viku. Í mars og november høvdu vit tema- og hugnakvøld fyri avvarðandi og húsfólkum, har okkurt fakligt var á skrá, og síðani var onkur uttanífrá komin at syngja og spæla. Garðdagur var fyrst í mai, sum var skipaður sum ein arbeiðs- og hugnadagur fyri húsfólk, avvarðandi og starvsfólk. Í juni vóru vit eina útferð í Vágunum. Síðst í november var jólahald fyri húsfólk og avvarandi.

### Starvsfólkamenning

Starvsfólkabólkurin hevur fingið undirvísing í flytingum og brunaskeið. Haraftrat hava nøkur starvsfólk verið til serstøk styttri skeið. Starvsfólkini hava verið starvsfólkaútferð í mai og havt jólahugna í november. Hvønn morgun byrja vit við felags morgundrekka fyri báðar deildirnar, har

vit øll práta saman, tosa um ymiskt í mun til búfólkini og leggja ætlan fyri dagin – hetta fyri at skapa integritet í arbeiðsgongdini og tryggleika og trivnað ímillum starvsfólkini. Einaferð um mánaðin er starvsfólkafundur.

## Giljagarður

Á Giljagarði eru 10 húsfólk, sum í løtuni eru fastbúgvandi. Miðalaldurin er 79 ár. Avsett eru 9,4 ársverk til starvsfólk, íroknað leiðslu og mattænasu. Fyrra helvtin av 2016 var merkt av, at bert 6 fólk høvdu fast pláss á stovninum. Nógvar umlættingar vóru, og í aug/sep vóru so fá húsfólk á stovninum, at vit í nakrar vikur valdu at lækka normeringina nakað. Hetta bar til, tí fleiri av fastløntu starvsfólkunum vóru í feriu hetta tíðarskeiðið. Eisini hjálptu starvsfólkini á Giljagarði til í útiøkinum hesa tíðina, tá minni var at gera á Giljagarði.

### Fysisku karmarnir

Karmarnir eru góðir og heimligir, og lætt er at flyta seg bæði innan- og uttandura. Ynskiligt er at fáa eina eyka stovu til t.d. føðingardagar, fundarvirksemi og har, húsfólkini kunnu fara við sínum avvarðandi og vera fyri seg sjálv. Húsfólkini hava gleði av vakra urtagarðinum, og vit síggja fram til, at gøtan yvir til Garðsveg verður gjørd liðug - vónandi innan ikki alt ov langa tíð. Hetta fer at gera tað møguligt at ganga longri túrar við búfólkunum.

### Virksemi

Gerandisdagurin er skipaður í tryggar karmar við eitt nú andakt, vitjanum av skúlabørnum og barnagarðsbørnum, upplestri, tónleiki og sangi. Eisini verður skipað fyri hugnaløtum, garðdegi og jólahugna. Sum nakað nýtt eru vit byrjað at hava bindiklubb á Giljagarði. Bindiklubbar í bygdini koma uppá skift inn á Giljagarð at hava bindiklubb fyri kvinnunum, sum búgva á stovninum. Hetta tiltakið hevur eydnast sera væl. Vit arbeiða við at gera okkurt tiltak, sum er meira rættað til menninar á stovninum.

Tíðin hjá starvsfólkunum er avmarkað, og av tí sama hava tey ikki tíð til annað enn at veita húsfólkunum ta neyðugu røktina. Gerandisdagurin hjá húsfólkunum kann tykjast langur, tí tey megna ikki at skapa sær ein innihaldsríkan gerandisdag. Stórt ynski er um, at Giljagarður fær nakrar tímar inn um vikuna til eitt ítrivsfólk.

### Starvsfólkamenning

Í 2016 fingu starvsfólk møguleika at fara á skeið. Ein heilsurøktari og tveir heilsuhjálparar vóru á skeiði í handfaring av heilivágii, og trý starvsfólk vóru á skeiði í dysfagi. Skeiðini vórðu hildin á Landssjúkrahúsinum. Starvsfólk vóru til undirvísing úti á ERE í samband við hoyrn og sjón hjá eldri. Øll starvsfólkini á Giljagarði vóru á brandskeiði, fingu felagsundirvísing frá økisterapeutunum og fingu undirvísing frá William Smith, smittufrøðingi, í smittuverju og mótstøðuførum bakterium. Deildarleiðarin tók grundleggjandi leiðsluskeið á 10 ects í akademiútbúgvingini á Glasir.

## Miðstøðin

Í 2016 fingu áleið 37 fólk heimahjálp. Miðalaldurin er 80 ár, 23 kvinnur og 14 menn.

Áleið 68 fólk fingu sjúkrarøkt. Afturat hesum kemur sjúkrarøkt, ið verður veitt fólkum á sambýlunum. Sjúkrarøktarfrøðingur á Miðstøðini hevur ábyrgd fyri sjúkrarøktini í øllum økinum hjá Nánd í kvøldvaktunum og í vikuskifinum. Í 2016 vóru avsett 8,95 ársverk, íroknað leiðslu og reingerð. Starvast verður í dag-, kvøld- og náttarvaktum, tó er størsti parturin dagvaktir. Eitt stutt skifti, tá tað var nógv at gera á Miðstøðini, fingu vit hjálp frá Giljagarði, sum riggaði væl. Lítil frávera hevur verið vegna sjúku.

### Fysisku karmarnir

Hølini eru væl staðsett og tætt við lækna, sum er ein fyrimunur fyri samstarvi. Hølini er hugnalig, men ov tronglig. Neyðugt er at fáa betri arbeiðsumstøður. Bilarnir eru nýggir og koyra væl. Visitator og heimahjálpin hava verið felags um tann 5. bilin. Hetta hevur havt við sær, at heimahjálpin hevur koyrt við egnum bili onkrar dagar. Vit hava fingið arbeiðsbúnar, sum verða vaskaðir á Gøtubrá. Flestu starvsfólk eru væl nøgd við búnarnar.

### Virksemi

Virksemið hevur ikki verið merkt av eins nógvari røkt til doyggjandi sum í 2015, tó hava verið nøkur doyggjandi sjúk fólk, sum ynsktu at vera í egnum heimi. Her var talan um kompliseraða røkt og sjúkrarøkt. Eitt fólk var, ið hevði tørv á dupultari hjálp. Sjálvt um talið á brúkarunum, sum fáa hjálp, mestsum er óbroytt frá 2015 til 2016, so hava uppgávurnar flutt seg til, at t.d. fáa brúkararnir fleiri vitjanir eitt nú í endurmenningarskeðinum. Bólkurin av brúkarum, sum hava demens og búgva heima er vaksandi. Her hevði verið áhugavert at arbeitt meira við hagtølum, eitt nú í mun til demens. Miðstøðin hevur havt tætt samstarv við fysio- og ergoterapeutarnar, serliga hvat viðvíkur brúki og umsókn av hjálpitólum og viðvíkjandi fysiskari venjing í hølunum í Fuglafirði.

### Starvsfólkamenning

Skipað undirvísing hevur verið við internum og eksternum undirvísarum. Supervisjón hevur verið nakrar ferðir fyri betur at kunna megna ávísar avbjóðandi uppgávur úti í heimunum. Tey starvsfólk, sum eru til arbeiðis á Miðstøðini, møtast hvønn gerandisdag frá 12.30 til 13.00, har matpakkin verður etin og har møguleiki er fyri, at taka ivamál og spurningar beinanvegin. Ein sjúkrar.fr. hevur tikið útbúgving á Setrinum sum vegleiðari, so nú kunnu vit aftur taka ímóti lesandi í starvsvenjing. Ein sjúkrar.fr. frá LS, sum tekur master í palliatión, hevur verið í starvsvenjing á Miðstøðini, har hon eisini undirvísti starvsfólkunum á Miðstøðini um sama evni. Tveir sjúkrar.fr. vóru tveir dagar í part á vitjan á B6 palliativu eind í februar og mars 2017 við tí endamáli at økja fakliga førleikan og fyri at styrkja samstarvið við palliativu eindina.

Samanumtikið eitt væleydnað ár, har mett verður, at borgarin hevur fingið eina góða tænastu.

nánd
Heimatænastan

# Visitatión og fyribyrgjandi heimavitjanir 75+

## Visitatión

12 visitatiónsfundir vóru í 2016. Umleið 35-40  revisiteringar og 14  nýggjar visitatiónir sum kravdu heimahjálp v.m. 4 nýggjar visiteringar vóru  í mun til búpláss, 7 í mun til umlætting og 6 í mun til dagtilhald fyri minnisveik. Eisini blivu nakrar reguleringar gjørdar við heimahjálp og tørvi á umlætting og búplássi. Umframt hetta vóru nakrar, har bert var tørvur á sj.r.fr. ella ØT. Visitatiónsarbeiðið inniber eisini at móttaka og skráseta umsóknir um búpláss/umlætting/dagtilhald og umsitingarligt arbeiði í mun til samtykki, svarskriv og visitatiónfundir. Visitatión er eisini  framd  inni á L.S. og K.S. Allar áheitanir um heimahjálp, umlætting og búpláss verða skrásettar og upplýsingar handfarnir í KT skipanini 3V. 5 ansingarmál hava verið, ið hava kravt fleiri fundir, fundarfrágreiðingar, metingar og annað umsitingarligt arbeiði. Umleið 2 ferðir árliga er felagsfundur fyri øll í Føroyum, sum arbeiða við visitatión. Hesir vóru í Tórshavn  og á Sandi í 2016. Á hesum fundum er møguleiki at læra av hvørjum øðrum, sparra og taka ávísar støður/"casir" og evni upp. Løgfrøðingur hevur verið inni og tosað um ansingarmál. Tosað hevur verið á landsplani, um evt. útbúgving innan visitatión.

## Fyribyrgjandi heimavitjanir

Í 2016 vóru 260 borgarar eldri enn 75 ár í samstarvinum hjá Nánd. Eins og í 2015 blivu tey, ið fingu heimahjálp, sj.r.fr. og tey, ið høvdu dag ella døgntilboð frávald. 154 borgarar av hesum fingu innbjóðing um fyribyrgjandi heimavitjan. 32 tóku av heimavitjan.  Skrivligar metingar fyriliggja frá hesum vitjanum. Sí talvur niðanfyri viðv. býti millum kommunurnar.







Kunningartiltak til tey, ið blivu 75 ár í 2016 var 03.10. 2016 á bátasavninum í Leirvík. 24 fingu innbjóðing til tiltakið og umleið 10 fólk  møttu. Umleið 2 ferðir árliga er felagsfundur fyri øll í Føroyum, sum arbeiða við fyribyrgjandi heimavitjanum. Hesir vóru í Runavík og Vestmanna í 2016. Sálarfrøðingur hevur havt um evni "motiverandi samrøðan", og tosað hevur verið á landsplani, um evt. útbúgving innan fyribyrgjandi heimavitjan.

Góðkend á stýrisfundi hjá Nánd tann 6. juni 2017 (ktl)